**Fundarfrásøgn**

| | |
|---|---|
| Heiti: | Leiðslufundur |
| Sendast til: | Sigurð í Jákupsstovu (SíJ), Jørgen Meitilberg (JM) og Hans Pauli Joensen (HPJ) |
| Til staðar á fundinum vóru: | SíJ, JM, HPJ |
| Skrivað hevur: | JM |
| Fundartíð: | Týsdagur, 18. november 2014 |
| Fundarstað: | SSS |

Mál til støðutakan:
Einki mál innkomið.

Mál til umrøðu:

1 Mannagongd fyri setanarpolitikk

JM legði fram uppskot fyri setanarpolitikk. Uppskotið varð viðgjørt, men enn eru nøkur ivamál, sum skulu fáast uppá pláss. Eftir ætlan verður mannagongdin góðkend á næsta leiðslufundi.

2 Leigumálið í Bókbindaragøtu

Fyrisitingarstjórin hevði fund við útleigaran fríggjadagin 14. november 2014. Útleigarin boðaði frá, at annar leigari er áhugaður í at leiga hølini, tá leigumálið gongur út 31. apríl 2016. Útleigarin boðaði somuleiðis frá, at Setrið skal rokna við at leigan fer at dýrka um áhugi er fyri at leiga hølini eftir 31. apríl 2016.

Fróðskaparsetrið hevur vent sær til Mentamálaráðið fyri at kanna um tað ber til at læna Handilsskúlan sum eina fyribilsloysn meðan bíðað verður einum kampussi á Frælsinum. Málið skal tó lýsast betur. Fyrisitingarstjórin fer at heita á MMR um at útvega tekningar yvir skúlan fyri at kunna meta um brúkið.

*fyrisitingarstjórin*